# TWR –Kvinnur við Vón

## Bønaráheitanir - januar 2024 – Europa

1. Gud, lat kvinnur í Albania, ið hava verið fyri ágangi, fáa dirvi at melda teir, ið framdu ágangin. Lat hesar kvinnur finna grøðing og vón í Jesusi. (Sálmur 130:7)
2. Harri, gev Anju íblástur, tá ið hon skal leggja TWR *Kvinnur við Vón* sendingina *Rise and Shine* (*Statt upp og skín*) til rættis í Belgia. (Matteusar ev. 10:20)
3. Gud Faðir, vit biðja, at *Kvinnur við Vón* sendingin á kroatiska málinum er viðkomandi og nemur kvinnuhjørtini á serstakan hátt. (Sálmur 119:105)
4. Faðir, vit biðja, at Tú sært til kvinnurnar í Danmark, ið liva undir træla-líknandi umstøðum, verða útnyttaðar og liva í ótta fyri harðskapi. Ver hjá teimum og bjarga teimum. (Fyrsta Mósebók 16:13)
5. Harri, gev flóttafólkakvinnunum í Europa vísdóm, tá tær skulu velja sær felagsskap við menn at liva saman við, samstundis sum tær kanna møguleikar, ið kvinnur ikki høvdu í gamla landinum. (Sálmur 32:8)
6. Faðir, vit biðja, at fólk í Grønlandi, ið hava mist onkran av sínum kæru, ið hava gjørt sjálvmorð, mugu koma til Tín at verða grødd og fáa frið í sinnið í staðin fyri sjálv at ynskja sær deyðan. (Matteusar ev. 11:28)
7. Harri, vit biðja, at finskar kvinnur, ið kenna strongd og trýst, tá ið tær samanlíkna seg við onnur á sosialu miðlunum, skulu finna sanna virði sítt í Jesusi Kristi. (Orðtøkini 3:13-17)
8. Harri, útvega neyðug tól og pening til felagsskapir, ið virka millum gentur og familjur, sum til dømis tær fátæku og mongu úr Bulgaria og Rumenia, ið eru í vanda fyri at gerast offur fyri menniskjahandli. (Seinna Korintbræv 9:8)
9. Himmalski Faðir, vit biðja Teg um at varðveita kvinnur í Fraklandi fyri teimum, ið gera seg kynsliga inn á tær. (Sálmur 116:6)
10. Gud, gev Stephanie Neeb, ið er nýggjur bønarsamskipari hjá ERF og TWR *Kvinnur við Vón* í Týsklandi, íblástur til skapandi hugskot at gera trúartænastuna kenda hjá enn fleiri fyribiðjarum og gevarum. (Sálmur 34:3)(ensk 34:2)
11. Harri, set kvinnur í Hollandi í frælsi frá skøkjulevnaði, og hjálp felagsskapum, ið náa út til tær, at geva teimum báði lívgan og evangeliska boðskapin. (Galatiabrævið 5:1)
12. Faðir, endurskapa mistu virðingina fyri gentum og kvinnum í Makedonia, ið hava verið viðfarnar lægri í tign, og vís teimum sín sanna samleika í Jesusi. (Rómbrævið 8:14-17)
13. Harri, gev kristnum trúgvandi kvinnum í Noregi styrki og dirvi at siga børnum sínum dagliga um Jesus við at vera góðar, andaligar fyrimyndir í gerandisdegnum. (Titusarbræv 2:7)
14. Gud, vit biðja, at sjúkraviðgerðin í Pólandi gerst betri, harvið eisini so, at har verður førleiki til at skurðviðgera fyri krabbamein í heilanum. Nógvir pólskir sjúklingar kunnu ikki fara uttanlands at fáa hesa kostnaðarmiklu viðgerð. (Sálmur 40:6) (ensk 5)
15. Harðskapur, hjúnaskilnaður, misnýtsla og pornografi ávirka í øktan mun portugisiskar familjur. Harri, gev hesum líðandi familjum endurbøting. (Jeremias 17:14)
16. Harri, opinbera Teg fyri unga fólkinum í Rumenia; lat hjørtu teirra vera opin til at elska Teg. Fría tey frá rúsevnum og bundinskapi, og endurnýggja lív teirra. (Sálmur 18:17-18) (ensk 18:17)

17. Faðir, opinbera Teg fyri einum og hvørjum, sum sigur frá, at tað ber til at taka ímóti sendingunum, ið toymi okkara í Norður Kaukasus ger. Lat hesar lurtarar koma at kenna Teg gjøgnum tænastuna, tá okkara toymi boðar teimum sannleika, uggan og stuðul. (Rómbrævið 15:13)
18. Gud, vit biðja, at Tú letur upp dyr, so at eitt ljóðstudio kann byggjast til toymi okkara í Serbia, har tey royna at broyta lívið hjá kvinnum við skapandi innihaldi. (Efesusbrævið 3:20)
19. Harri, vit biðja, at lógin móti menniskjahandli verður samtykt í Spania fyri at verja mongu genturnar og kvinnurnar, ið uppliva trælahandil og kynsliga misnýtslu. (Sálmur 103:6)
20. Faðir, vit biðja fyri børnunum í svensku skúlunum, ið stríðast við sín samleika; lat upp eygu teirra, so tey kunnu síggja seg sjálv, eins og Gud ger. (Markusar ev. 8:25)
21. Harri, varðveit og styrk TWR toymið í Ukraina, ið varð verandi í Ukraina fyri at tæna fólki sínum har og signa tey. Lat boðskapin um vón í Jesusi framhaldandi verða útvarpaðan og náa fram til nógvar kvinnur á netinum. (Esaias 40:31)
22. Himmalski Faðir, lat einleika ráða í albanskum kirkjum og samkomum, so at tey kunnu virka saman at náa land teirra fyri Kristus. (Fyrra Korintbræv 1:10)
23. Harri og Gud, signa verkið hjá okkara kroatiska samstarvsfelaga, Hana, og toymi hennara, ið hjálpa skøkjum og rúsevnismisnýtarum at finna frælsi á herberginum í Zagreb. (Orðtøkini 14:21)
24. Harri, styrk hjúnaløgini í Føroyum, so at kærleiki, virðing og umsorgan eyðkennir samlívið. Verj tey frá álopum Satans. (Fyrra Pætursbræv 4:8)
25. Vit biðja, at trúartænastan hjá serbiska toymi okkara millum romakvinnur má mennast og fáa stuðul. Harri, lat romafólkið síggja virði sítt í eygum Tínum. (Jeremias 29:11)
26. Vit biðja, at ein stuðulstænasta kann verða sett á stovn í Noregi til kvinnur, ið velja at ganga við børnum sínum og hava tey, hóast tær óvæntað eru vorðnar við barn. (Galatiabrævið 6:2)
27. Jesus Kristus, Tú eina ert Harri. Vilt Tú opinbera henda sannleika fyri fólkinum í Polandi, so tey einans tilbiðja Teg. (Filippibrævið 2: 9-11)
28. Harri, nú sálarliga heilsan eyðsæð er versnað í Portugal eftir alheimsfarsóttina, lat fólkið fáa betri atgongd til medisinska viðgerð, ein størri varhuga um sjúkur, og ikki skammast at biðja um hjálp. (Filippibrævið 4:6-7)
29. Styrk trúnna hjá kristnum trúgvandi mammum í Rumenia, Harri, og hoyr bønir teirra, at øll í heimum teirra verða frelst. (Fyrra Pætursbræv 3:1-6)
30. Harri, ver vernd hjá ungum kvinnum í Spania. Verj tær frá hópneyðtøku, og fría tær frá harðskapi. (Seinna Sámuelsbók 22:3-4)
31. Faðir, signa systur okkara í Ukraina, sum mitt í øllum krígnum heldur á at týða bønarkalendaran til russiskt mál fyri Ukraina, Russland og Mið Asia. (Jeremias 17:7-8)

**”Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar, so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!” (Hebrearabrævið 4:16)**

**Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva**

# Eitt nýtt ár – ein nýggj bók

Hetta er ein nýggjur dagur – og eitt heilt nýtt ár! Byrjanin á einum ári kann samanberast við eina bók við 365 blonkum síðum. Hvørjar eru søgurnar, ið henda bók fer at siga frá? Man tað vera so hjá øllum, at kapittul 1 er fullur við ætlanum og nýggjárslyftum? Eg ímyndi mær, at summir dreymar somuleiðis verða eisini at finna í onkrum av kapitlunum.

Nýggjar byrjanir eru hugkveikjandi. Vit hyggja móti framtíðini við væntan. Vit tora at droyma um nýggju søgurnar, sum vit fara at luta við tykkum um nakrar mánaðir. Hvat verður innihaldið í okkara bók? Upplivingar? Romantikkur? Ella kanska er tað ein góð stuttsøga? Eg trúgvi, at tað fara vit at fáa greiðu á, tí Gud skrivar søgu hvønn dag og skrivar harvið søgu Sína í og gjøgnum okkum.

Uttan mun til, hvat slag av bók tað er, fara bøkur okkara at vera um veruliga lívið. Tað slagið dámar mær best. Hendingarnar eru ikki kendar frammanundan. Tær eru fyltar við avbjóðingum, óvæntaðum gongdum, onkrum avrikaðum virki, upplivingum, eitt sindur av romantikki, og enntá onkrum spennandi! Tað besta í øllum hesum er, at vit eru ikki einsamøll. Vit hava ein stóran ritstjóra, ið leiðbeinir okkum gjøgnum alt.

Hóast við eru greið um, at okkurt, ið verður skrivað í bók okkara, hava vit als onga ávirkan á, vita vit eisini, at vit taka aktivt lut í tilgongdini. Vit verða mint á hetta í Efesusbrævinum 5:15, ið sigur: "*Aktið tí væl eftir, hvussu tit liva, ikki sum óvís, men sum vís.*" Sum høvuðspersónar í tí, sum hendir hjá okkum, mugu vit serliga geva tveimum økjum í lívi okkara gætur: okkara hjarta og okkara sinni.

Eins og í eini krígssøgu, er sinni okkara ein stórur vígvøllur. Tað er har, ið okkara tilvísingar, lívsáskoðanir, hátturin vit viðgera upplýsingar, og hvussu vit skilja støðuna hjá fólki og hvussu umstøðurnar eru. Haraftrat hava hugsanir okkara beinleiðis ávirkan á kenslur okkara. Hugsanir okkara kunnu vekja ymiskar kenslur. Tí er tað týdningarmikið, at vit spyrja okkum sjálv: Hvør er dygdin í hugsanum okkara? Filippibrævið 4:8 gevur okkum eina frálíka eftirlitsskrá: *"Og síðani brøður: Alt, sum satt er, alt, sum sámuligt er, alt, sum rætt er, alt, sum reint er, alt, sum elskuligt er, alt, sum væl verður talað um, eina og hvørja dygd, ein og hvønn heiður – hugsið um hetta!"*

Skynsemi hjálpir okkum at síggja tær avbjóðingar, ið frásagnirnar í nýggja árinum fara at bera okkum. Orð Guds er ein óendalig vísdómskelda. Hon hjálpir okkum á ein sera praktiskan hátt í gerandisdegnum, soleiðis: "*Latið orð Kristusar búgva ríkliga millum tykkara, so tit í øllum vísdómi læra og áminna hvørt annað við sálmum, lovsongum og andaligum vísum og syngja yndisliga í hjørtum tykkara fyri Gudi!* (Kolossebrævið 3:16). Eitt sinni, ið er í samsvari við Harrans, er sunt, glatt og víst. Tað er til reiðar til andaligan bardaga.

Hjarta okkara er eins týdningarmikið og sinni okkara. Jesus segði, at út úr hjartanum koma ringar hugsanir. Tað er har vit goyma øvund og agg, fylla okkum við órógv, og ala fram óndar tráanir. "*Varðveit hjarta títt, fram um alt, ið varðveitt verður, tí úr tí gongur lívið út.*" (Orðtøkini 4:23). Tað er eisini har, vit fjala okkara sterkastu kenslur og størsta kærleika, sum er okkara drívmegi alt lívið. Tað er eingin betri háttur at varðveita hjarta okkara, enn at: *elska HARRAN Gud tín av øllum hjarta tínum, av allari sál tíni og av allari styrki tíni. (5.Mósebók 6:5)*

Tá ið sinni og hjarta okkara eru yvirgivin Harranum, broytist lívsáskoðan okkara á fólk og á heimin. Vit síggja, sum Hann sær. Orð Hansara er okkara leiðbeining í gerandisdegnum, vit leggja stúranir okkara á Hann, vit fara í bøn til Hansara, og at enda: vit liva einans fyri Hann. Eg biði um, at "bøkur" okkara fyri 2024 siga frá søgu Hansara um endurloysing uttan mun til, hvat slag av bók tað er.

Takk fyri, at tit biðja saman við okkum, so at søgurnar um vón og endurloysing kunnu verða skrivaðar í lívini hjá kvinnum í fleiri túsunda tali kring allan heimin og tvørtur um ættarlið.

Í kærleika Frelsarans,

Susie Pek
Altjóða leiðari fyri TWR *Kvinnur við Vón*

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope.org**

**"Høvuðsstuðulin í øllum kristiligum arbeiði er bøn"** **(Eeva Vähäsarja)**

## Fíggjarstuðul:

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**